Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Bárður á Lakjuni, løgtingsmaður

Svarari: Dennis Holm, landsstýrismaður í fiskivinnu- og samferðslumálum

Evni: Friðaðar/stongdar fiskileiðir og dokumenteraður virknaður av átøkunum

Spurningar:

1. Hví verða fiskileiðir friðaðar/stongdar?
2. Hvussu stórur prosentpartur av reellu fiskileiðunum á landgrunninum eru fullkomiliga ella partvís friðaðar/stongdar fyri trol?
3. Hvørjar søguliga góðar fiskileiðir til trol hava verið friðaðar ella stongdar longst?
4. Hvussu verða stovnsmetingar gjørdar?
5. Ber til at dokumentera, at virknaðurin á friðaðum/stongdum leiðum er positivur – tað vil siga, at átøkini virka eftir ætlan?

Viðmerkingar:

Í mong ár hevur verið friðað/stongt á reellum fiskileiðum á føroyska landgrunninum. Summar reellar fiskileiðir, serliga hjá troli, hava verið friðaðar í mong ár, og sum skilst, so verður framvegis og framhaldandi friðað/stongt antin partvíst ella fullkomiliga.

Áhugavert hevði verið at fingið at vita, hvør hugsanin og endamálið handan hesa friðing er, og um tað ber til at fáa sligið fast, at friðingarnar tæna sínum endamáli.

Tískil verða hesir spurningar settir avvarðandi landsstýrismanni.

Á Løgtingi, 13. september 2024

Bárður á Lakjuni